## HB-venjarin skjótt settur

Hóast roknað varð við, at HB longu mánadagin skuldi seta venjara, so er hesin enn ikki settur. Ljóðað hevur, at Kári Nielsen skuldi verða nýggjur venjari, men tað tykist óvist í løtuni. – Allir møguleikar eru enn opnir, men viðvíkjandi Kára, so hevur hann eisini sáttmála við H71, sum hann skal venja. Men vit vóna, at spurningurin er greiddur undan vikuskiftinum, tá spælararnir aftur fara undir venjingina, sigur Steinfinn Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur.

## Taptar fjórðingsfinalur

Tað eydnaðist ikki nakrari av føroysku doublunum at vinna seg í hálvfinaluna í borðtennis. Hallur Thorsteinsson og Ragnar Egilsson spældu í gjár fjórðingsfinalu móti einum liði av Gibraltar, og taptu teir hendan dystin 3-0. Tað gjørdist eisini úrslitið, tá Susie Midjord og Shaila Strøm spældu móti einum hetlendskari kvinnudoublu.

# Súkklustríðið avgerast í dag

**Føroyska liðið fær við vissu sivlur fyri landavegssúkklingina. Spurningurin er, hvørt hetta kann broytast til gull**

Súkkling
Jákup Mørk
HYPERLINK "mailto: jakup@sosialurin.fo"
jakup@sosialurin.fo



*Tað tók meira enn eitt samdøgur at fáa úrslitini fyri landavegssúkklingina til vega. Í gjár fundaðust liðini um tað, sum hendi, og í dag verður kæran um tveir súkklarar viðgjørd*

*Mynd: Høgni R. Øster*

Kæra er send inn um súkklararnar, sum stungu av frá feltinum í landavegskoyringini, longu áðrenn neutrali starturin var liðugur. Tað er ikki loyvt at koyra undan feltinum á hesum, men hóast hetta varð gjørt, so fekk tað ongar avleiðingar. Tvørturímóti, so vórðu somu súkklarar væl løntir, tá teir fingu 2,40 minuttir til góðar, tá nýggjur startur mátti avgreiðast.

Og hetta hevur fingið øði í. Súkklukappingin sjálv var liðug týsdagin, men ikki fyrr enn mikukvøldið komu úrslitini út. Og hesi eru altso ikki meira rættvísandi enn so, at tey enn kunnu broytast.

Fær kæran viðhald, so hevur tað stórar avleiðingar fyri føroyska liðið. Føroyska liðið liggur í løtuni á einum flottum silvurplássi, men fær kæran ta avleiðing, at tveir súkklarar verða útblakaðir, so broytist hetta til gull. Í løtuni eru Bogi Kristiansen, Gunnar Dahl-Olsen og Torkil Veyhe á ávíkavist 5, 7 og 15 plássi, men tað kann so broytast til 4, 6 og 13 pláss, og tað togar liðið upp til samanlagt gull. Eitt gul, sum – um so verður – verður tað fyrsta hjá føroyskari súkkling í oyggjaleikahøpi.

## Tora betri heitir

Hóast servurnar í flogbóltsspælinum ofta kunnu tykjast misjavnar, so tykist føroyska liðið nú av álvara at hava funnið stevið. Nakað sum annars kundi tykjast trupult fyrsta dystin, men móti Cayman sótu tær aloftast rætt.

Hóast hann ikki hevur nakra einfalda frágreiðing, so heldur Ragnar í Haraldsstovu, at hetta kanska hevur nakað at gera við, at høllin er heitari, enn føroysku spælararnir eru vanir við.

- Tú torir betri at sláa ígjøgnum, tá tú ert heitur, og tað ert tú alla tíðina her. Varsemið hevur mest sum hug at hvørva úr spælinum, og kemur tú so ígongd, so koyrir tað bara. Í dag siggja vit eisini, at Rúni er við at raka servurnar rætt, og tá verða tær eisini heilt vandamiklar, helt Ragnar, tá vit tosaðu við hann eftir sigurin á Cayman Islands.

**-mørk**



*Hitin ger helst, at tú torir betri frá byrjan, enn tú vildi gjørt í eini kaldari høll, heldur Ragnar í Haraldsstovu*

*Mynd: Jákup*

Føroyar-Cayman Islands 3-0 (25-13, 25-18, 25-17):

# Innandura er betri

**Caymanski beachstílurin fekk ikki ein livandi møguleika, tá føroysku innandura-serfrøðingarnir vunnu triðja 3-0 sigurin á oyggjaleikum**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast Føroyar væl og virðiliga vórðu mettir sum favorittar, so vistu spælararnir av, teir avgjørt ikki skuldu undirmeta Cayman oyggjarnar. Hóast spæl teirra er í besta primitiva beach-stíli, so kunnu teir gera ein vørr av og á. Eitt nú, tá teir í bólkaspælinum brádliga vunnu eitt sett í dystinum móti gullfavorittunum av Saaremaa.

Og tann ávaringin kom kanska væl við hjá okkum. Í øllum førum varð beachstílurin hjá Cayman sópaður burtur frá fyrsta bríksli. Sleppa hesir framat smashunum, so kunnu teir væl verða vandamiklir, men tað sluppu teir tó sera sjáldan, tí føroyska trýstið als ikki loyvdi hesum. Ogg funnu teir loksins vegin fram til eina heving, so var føroyski blokkurin aloftast klókari enn power-smash stílurin hjá stórum mótstøðumonnunum.



Fyrsta settið var ein total útradering, og tó at tey bæði næstu ikki gjørdust eins stór Føroya-framsýning, so var ivin ongan tíð til staðar.

Og hóast avmarkaðu mótstøðuna, so vóru eisini glottar at hóma í føroyska spælinum. Fyrstu tveir dystirnar hevur Jón Nielsen staðið fyri bróðurpartinum av føroysku slagkraftini, men hesa ferð komu aðrir eisini væl við. Ikki minst var hugaligt at síggja Rúna Weihe, sum hóast nøkur mistøk veruliga tykist vera ávegis stórforminum, nú truplu dystirnir nærkast.

Hósdagin verður hálvfinala á skránni, og tá verður tað Rhodos, sum Føroyar skulu stríðast ímóti.